# Jólakalendarin 2005

# Jólini í Hvannadali

**Partur 14**

Tey leypa so á dýr og renna út á vegin. Tey renna gjøgnum bygdina og halda niðan í bøin. Tey kunnu ikki fara heim, tí tá politistarnir finna út av, at tey eru flýdd, so er tað fyrsta staðið, sum teir fara at leita í. Men nú er bara at renna og renna. Tey eru nú komin langt niðan í bøin, ja heilt niðan til skúrin, har Leikamafian heldur til.

- Her kunnu vit fara inn og hugsa um, hvat vit skulu gera, sigur Trølla Omman meðan hon tivar.

Í tí at tey skulu fara inn, hyggur Trølla Pætur gjøgnum vindeygað.

- Steðga omma – har er onkur inni, teskar Trølla Pætur.

- Hvat er tað tú sigur?

- Hygg omma. Og so lúra tey bæði inn gjøgnum vindeygað. Tey síggja, at skúrurin er fullur í gávum, og tey síggja í høvdini á Stampa og Anthonio.

- Tað eru Leikamafian sum hevur stolið alt, teskar Trølla Omman í oyra á Trølla Pætur.

- Og sært tú hasi ljótu jólamannaklæðini. Tað eru Stampi og Anthonio sum vóru jólamenninir sum tendraðu jólatræið.

- Men góði Trølla Pætur, um teir hava verið jólamenn, hvar er so tann rætti jólamaðurin?

Júst tá fara pakkarnir, sum liggja á gólvinum, at liva. Tað er jólamaðurin, sum nú er komin so mikið væl fyri seg, at hann byrjar at flyta seg og hevur hug at reisa seg. Trølla Pætur og Trølla Omman hyggja upp á hvønn annan, tá tey síggja jólamannin reisa seg.

- JÓLAMAÐURIN, hvat ger hann her? spyrja tey hvønn annan.

Men tað dugir Trølla Omman skjótt at rokna út.

- Sært tú holið, sum er í takinum, Trølla Pætur? Jólamaðurin er heilt sikkur dottin niður gjøgnum takið, og so er hann svímaður. Síðani hava hasir jassarnir latið seg í nøkur følsk jólamannaklæði og hava stolið allar gávurnar frá jólamanninum og allar gávurnar frá fólkunum í Hvannadali.

- Hygg nú kemur jólamaðurin út, omma. Kom aftur um skúrin og krógva teg og so hálar Trølla Omman Trølla Pætur aftur um skúrin. Tey krógva seg millum nakrar gamlar hegnpelar og eitt rustað hegn.

Jólamaðurin fer spakuliga yvir til hurðina. Hann heldur um høvdið og má halda sær fyri hvørt fet, hann tekur, so ússaligur er hann. Hann letur hurðina upp fyri at fáa fríska luft, men í tí hann stingur høvdið út um, teskar Trølla Omman.

- Jólamaðurin, kom her.

Jólamaðurin blívur sum verða man sera bilsin av hesum, men gongur aftur um skúrin.

- Trølla Pætur og Trølla Omman, eru tað tit bæði?

- Shhhh ikki so hart, teskar Trølla Omman aftur.

- Vit mugu ikki vekja Stampa og Anthonio.



*Puntur 20 til jólakalendaran*






Cadbury

- altíð ein vælkomin jólagestur